Fróðskaparsetur Føroya

23. november 2009

**Fundarfrágreiðing til fund í bygnaðarbólkinum 1/2009**

Dagur og klokkutíð: Tórsdagur 19. november 2009 kl. 13.00 – 14.30

Fundarstað: Sjúkrarøktarfrøðiskúlin

Til staðar: Súsanna Mortensen, Jóannes Hansen, Hans Pauli Joensen, Zakaris Svabo Hansen, Anni Djurhuus, Hanna Hors, Birgit Fredriksberg og Rúna Hjelm.
Randi Durhuus og Kári á Rógvi kundu ikki møta.

**Skjøl sum vóru flýggjaði út á fundinum:**
Lógin um Fróðskaparsetur Føroya, arbeiðssetningar um ávikavist bygnaðar- og strategitilgongd á Setrinum, organisasjónsdiagram fra Århus Universitet, notat um útbúgvingar og skeið á Setrinum, hovedlinier for RUC's bestyrelsesarbejde og grein av Christian S. Nissen við heitinum: Forandringernes veje og vildveje í bókini: *Offentlig ledelse på dagsordenen*, Steen Hildebrandt og Kurt Klaudi Klausen eds. (Børsens Forlag 2001).

1. **Kunning um arbeiðssetning v.m.**
Súsanna Mortensen og Rúna Hjelm kunnaðu um arbeiðssetningin fyri bygnaðarbólkin. Víst varð millum annað á, at ætlanin er, at tað skal vera ein ávísur samanhangur millum bygnaðar- og strategitilgongdina á Setrinum, og kunnað varð tí eisini um arbeiðssetningin fyri strategitilgongdina. Harumframt varð eisini kunnað um lógina fyri Fróðskaparsetrið, og víst varð á, at arbeiðssetningarnir millum annað byggja á lógina fyri Setrið. Semja var um, at til komandi fund skuldu øll kunna seg um útflýggjaða tilfarið. Á hesum fundinum skulu vit millum annað taka avgerð um, hvussu arbeiðið skal leggjast til rættis, eisini soleiðis at vit náa at viðgera øll punktini í arbeiðssetninginum fyri bygnað á Setrinum áðrenn freistina í viku 6/2010. Ein ætlan fyri kunning til starvsfólk og lesandi um arbeiðið í bygnaðarbólkinum skal eisini gerast.

2. **Fundarætlan**
Avtalað varð, at komandi fundur verður mánadagin 30. november kl. 13 á Náttúruvísindadeildini, og at fundurin hareftir verður 14. desember kl. 13.00. Avrátt varð eisini, at bólkurin skuldi hava ein fund yvir tveir arbeiðsdagar fyrst í februar, tá niðurstøðurnar frá strategiarbeiðinum á deildunum skal vera liðugt, tí so ber til at taka atlit til hesar niðurstøður í viðgerðini og niðurstøðuni av arbeiðinum við bygnaðarligu møguleikunum á Setrinum.



| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |